Sambandið søguligan sigur í Suðuroy

Tjóðveldisflokkurin liggur aftan fyri allar hinar stóru flokkarnar í kappingini um at vinna umboð í Suðuroy

SUÐUROYAR VALDØMI
Jóannes Hansen

Mynd: Johan Dahl
Ikki síðani 1954 hevur Sambandsflokkurin átt tveir umdømisvaldar tingmenn í Suðuroy, men sambært veljarakanningini, so fær Johan Dahl ein partamann aftrurat í oynni eftir 20. januar

Hevði løgtingsvalið havt verið hóskvøldið í síðstu viku, hevði Sambandsflokkurin vunnið eina sovorðna støðu í Suðuroy, sum hann ikki hevur havt í 45 ár. Hetta hevði gingið út yvir Tjóðveldisflokkin, sum sambært veljarakanningini hevði langt frá at endurvinna sessin, sum teir á flestu valunum síðani 1970 hava átt.

Javnaðarflokkurin varðveitir støðuna sum nógv tann størsti flokkurin í Suðuroyar valdømi. Sambært kanningini fer hann at endurvinna teir báðar sessirnar, sum hann í minst lagið hevur vunnið á øllum valunum síðani í 1936.

Í kanningini fær Javnaðarflokkurin fyrsta mannin við 40,5 prosentum, Sambandsflokkurin fær annan mannin við 31,3 %, Javnaðarflokkurin triðja mannin við 20,25 %, og Sambandsflokkurin fjórða mannin við 15,65 %. Í kanningini hevur Javnaðarflokkurin 13,5 % í kappingini um triðja mannin.Tað er meiri, enn Fólkaflokkurin hevur við 12,1 % og meiri enn Tjóðveldisflokkurin, sum hevur 11,6 prosent.

Framúr sambandsstøða

Tað er ikki púra ókent, at Sambandsflokkurin hevur átt tveir valdømisvaldar tingmenn í Suðuroy, men nú er tað langt síðani, at tað kom fyri. Í vælmaktsdøgunum hjá Paula Ellefsen seinnapartin av sjeyti árunum og fyrrapartin av áttati árunum, tá ið Sambandsflokkurin hevði sera sterka støðu, eydnaðist tað onganti.

Vit skulu heilt aftur til 1954 fyri at finna síðsta valið, tá ið Sambandsflokkurin vann tveir valdømisvaldar í Suðuroy. Ta ferðina vórðu bæði Kristian Djurhuus og Andreas Djurhuus valdir. Á valinum í 1958 varð Kristian Djurhuus valdømisvaldur og Andreas Djurhuus eykavaldur, og síðani hevur Sambandsflokkurin hvørja ferð átt ein valdømisvaldan tingmann í Suðuroy.

Nú tykjast góðir møguleikar vera fyri, at Sambandsflokkurin í Suðuroy skal endurvinna støðuna, sum teir áttu, tá ið Kristian Djurhuus hevði verið løgmaður í fýra ár. Sammett við løgtingsvalið í 2002 vinnur Sambandsflokkuin í Suðuroy 5,3 %, og tað kann ikki sigast annað enn at vera stórsigur.

Javnaðarflokkurin hevur í Suðuroy, var í 1990. Sambært stóru kanningini hóskvøldið er møguleikin fyri trimum valdømisvaldum javnaðarumboðum í Suðuroy ikki heilt burtur. Hann er nærri, enn møguleikin fyri at Tjóðveldisflokkurin skal endurvinna sína umboðan tykist vera og enn at Fólkaflokkurin skal vinna valdømisvaldan tingmann. Men skal tað eydnast hjá javnaðarmonnunum at vinna triðja mannin, so skulu teir hesa síðstu vikuna í valstríðnum vinna meiri enn tvey prosent inn á Sambandsflokkin.

Tjóðveldið aftan fyri Fólkaflokkin

Sum allar aðra staðni kring landið, so tykist Tjóðveldisflokkurin at gerast stóri taparin í Suðuroy. Teir standa til at missa 6,9 prosent. Harvið skal nógv komandi týsdag venda upp, sum nú vendir niður, um umboðið skal endurvinnast. Sambært kanningini fær Tjóðveldisflokkurin tveir eykavaldar tingmenn. Tað er møguleiki fyri, at fleiri ferðir átt tríggjar valdømisvaldar tingmenn í Suðuroy. Síðsta ferðin, at teir rukku so góðum úrsliti í Suðuroy, var í 1990. Sambært stóru kanningini hóskvøldið er møguleikin fyri trimum valdømisvaldum javnaðarumboðum í Suðuroy ikki heilt burtur. Hann er nærri, enn møguleikin fyri at Tjóðveldisflokkurin skal endurvinna sína umboðan tykist vera og enn at Fólkaflokkurin skal vinna valdømisvaldan tingmann. Men skal tað eydnast hjá javnaðarmonnunum at vinna triðja mannin, so skulu teir hesa síðstu vikuna í valstríðnum vinna meiri enn tvey prosent inn á Sambandsflokkin.

Síðst Fólkaflokkurin í Suðuroy átti valdømisvaldan tingmann var í 1950, tá ið Martin Holm, sáli, varð valdur. Í 1958 varð Niels Holm Jacobsen eykavaldur fyri Fólkaflokkin í Suðuroy, men síðani 1962 hevur Fólkaflokkurin einki umboð havt í Suðuroy.

Sambandið størst í høvuðsstaðnum

Veljarakanningin ber møguleikan við sær fyri, at Fólkaflokkurin fyri fyrstu ferð síðani á valinum í 1974 bara fer at fáa ein valdømisvaldan tingmann í Suðurstreymi

SUÐUAR-STREYMOYAR VALDØMI
Jóannes Hansen

Saman við Óla Breckmann er Bjarni Djurholm í vanda fyri at missa sessin í Suðurstreymoy sambært nýggju veljarakanningini

Í Suðurstreymoyar valdømi er ein triðingur av samlaða atkvøðutalinum. Umframt í kappingini um teir átta valdømisvaldu tingmenninar er tað rættuliga avgerandi fyri landsúrslitið og harvið býtið at eykavaldum tingmonnum, hvussu undirtøkan er í Suðurstreymi. Hetta sæst hesa ferð serliga aftur hjá Fólkaflokkinum, sum sammett við síðsta løgtingsval í kanningini stendur seg hampuliga væl í øllum hinum valdømunum. Men í Suðurstreymi missir hann 3%.

Í veljarakanningini er Sambandsflokkurin størsturi í Suðurstreymi. At Sambandsflokkurin er størstur í høvuðsstaðnum er ikki nakað nýtt. Tað hevur hann so ofta verið áður. Framgongdin hjá Sambandsflokkinum er ikki so stór, sum hon í kanningini er í hinum valdømunum.

Støðan hjá Sambandsflokkinum í Suðurstreymi var hóskvøldið so mikið sterk, at flokkurin hevði vunnið tríggjar av átta valdømisvaldum tingmonnum, um valið hevði verið tá. Um tað eydnast Sambandsflokkinum at vinna trý umboð í Suðurstreymi, so verður hetta onnur ferðin, at teir fara at fáa so góða undirtøku, síðani vallógin í 1978 varð broytt og Suðurstreymoy fekk tillutað átta valdømisvaldar tingmenn. Fyrra ferðin var í 1994. Síðani 2002 hevur Sambandsflokkurin átt trý umboð í Suðurstreymi. Lisbeth L. Petersen og Heðin Mortensen hava verið valdømisvald, og Kaj Leo Johannesen hevur verið eykavaldur.

Tjóðveldið og Fólkaflokkurin missa

Sambært veljarakanningina hóskvøldið hevði Tjóðveldisflokkurin mist ein av teimum trimum valdømisvaldu tingmonnunum, og Fólkaflokkurin hevði mist annan av tveimum valdømisvaldu tingmonnunum. Men talan er um rættuliga tætta kapping. Triði sambandsmaðurin verður í kanningini valdur við 9,3 %, og Fólkaflokkurin verður við 8,6 % ov stuttur til at vinna nummar tvey mannin.

Tjóðveldisflokkurin, sum hevur átt trý umboð í Suðurstreymi tvær tær seinastu ferðirnar, er við 7,9 % í kanningini langt frá at fáa triðja mannin.

Javnaðarflokkurin hevur síðsta valskeiðið bara átt ein valdømisvaldan tingmann í Suðurstreymi. Sambært kanningini hóskvøldið tykjast vánir verða fyri at endurvinna tvey umboð, sum Javnaðarflokkurin átti á valinum í 1998.

Smáu flokkarnir tykjast ikki at hava møguleika at vinna valdømisvalt umboð. Eingin ivi er um, at eykamaðurin hjá Miðflokkinum verður valdur í Suðurstreymoy, og Sjálvstýrisflokkurin kappast við Eysturoyar valdømi um teirra eykamann.

Kendir persónar í kløtum tráði

Bæði í Fólkaflokkinum og Tjóðveldisflokkinum er sannlíkt, at um teir missa ein av valdømisvaldu tingmonnunum, so fara teir at fáa eykavaldar tingmenn í Suðurstreymi. Men tað er altíð meiri óvist við eykavaldu monnunum, enn tað er við teimum valdømisvaldu.

Um Fólkaflokkurin missir ein valdømisvaldan, so stendur landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm ella formaðurin í tingbólkinum, Óli Breckmann, fyri falli. Harafturat skal havast í huga, at Poul Michelsen, sum hevur verið í tinginum, meðan Bjarni Djurholm hevur verið landsstýrismaður, hevur verið mettur sum hóttan ímóti teimum báðum fyrr nevndu, nú Bjarti Mohr ikki er á fólkaflokslistanum í Suðurstreymi.

Møguligir taparar hjá Tjóðveldisflokkinum eru Kristina Háfoss, Annita á Fríðriksmørk og Høgni Hoydal, sum hava átt teir tríggjar umdømisvaldu sessirnar í Suðurstreymi. Og so skal leggjast aftur at, at Jógvan Arge og Rói Egholm, sum hava verið í tinginum partar av síðsta valskeiðnum, og Finnur Helmsdal, sum bar seg undan at møta, eru á listanum í Suðurstreymi. So har verður rættuliga trongligt.

Á javnaðarlistanum hevur Katrin Dahl Jacobsen verið valdømisvalt umboð. Kristian Magnussen hevur verið eykavaldur. Millum kappingarneytarnar hjá teimum telist eitt nú Helena Dam á Neystabø.

Norðoyingar liggja í stórari kapping

Fólkaflokkurin er framvegis størsti flokkur, og Sambandsflokkurin tykist ikki hava ongan møguleika at vinna valdømisvalda mannin, sum teir ikki hava átt í meiri enn 60 ár

NORÐOYA VALDØMI
Jóannes Hansen

Sum í flestu av hinum valdømunum, so verður tað stríðið næstu dagarnar um ivasomu atkvøðurnar,ið fer at gera av, hvør verður triðji og fjórði valdømisvaldi tingmaðurin í Norðoyggjum. Kanningin hóskvøldið staðfestir, at Fólkaflokkurin heldur rimmar fast um støðuna sum størsti flokkur í valdøminum hjá Anfinni Kallsberg, løgmanni. Hesa støðuna hevur flokkurin havt síðani í sjeyti árunum. Á valinum fyri tveimum árum síðani var munurin frá Fólkaflokkinum og aftur til hinar flokkarnar størri, enn hann áður hevur verið síðani kríggsárini, og kanningin hóskvøldið bendir á, at Fólkaflokkurin framvegis er væl størstur og tískil liggur til at fáa fyrsta valdømisvalda tingmannin.

Tjóðveldisflokkurin hevði í 2002 aftur gongd í Norðoya valdømi, og kanningin boðar frá, at flokkurin eisini hesa ferð fer at missa í valdøminum hjá Heina O. Heinesen, formanni í tingbólkinum, og Karsteni Hansen, fyrrverandi landsstýrismanni í figgjarmálum. Hóast Tjóðveldisflokkurin tykist fara at missa, so tykist hann framvegis at vera so mikið væl fyri har norðuri, at hann fer at vinna næstfyrsta valdømisvalda mannin.

Hvussu tað verður við triðja og fjórða manninum í Norðoyggjum er rættuliga óvist. Javnaðarflokkurin er í kanningini á triðja plássinum og tykist harvið at hava møguleika at endurvinna triðja mannin og sessin, um teir uttan slit hava átt í valdøminum síðani 1950. Fólkaflokkurin er á fjórða plássinum og er í kanningini besta boðið upp á fjórða valdømisvalda mannin. Tað vil við øðrum orðum siga, at um lutfallið á valinum týsdagin verður tað sama, sum tað er í kanningini, so verður floksumboðanin í Norðoya valdømi at verða nett tann sama, sum hon hevur verið tey bæði seinastu árini.

Javnaðarflokkurin og Vilhelm Johannesen á triðja plássinum tykjast at eiga so mikið góða undirtøku, at tað fer at eydnast hjá teimum at endurvinna sessin. Men tað kann ikki heilt síggjast burtur frá møguleikanum, at tætta kappingin millum Fólkaflokkin við 17,05 % á fjórða plássinum og Sambandsflokkin við 16,0 % á fimta plássinum kann gerast so stór, at Javnaðarflokkurin fer at detta niður ímillum.

Sambandsflokkurin var um reppið at vinna umboð í Norðoyggjum á valinum í 1994. Ta ferðina var Sambandsflokkurin bara átta atkvøður frá Javnaðarflokkinum og fjórða manninum. Sambandsflokkurin hevur ikki vunnið valdømisvalt umboð í Norðoya valdømi síðani á valinum 30. januar í 1940. Ta ferðina var O. F. Joensen ella Óli í Skúla valdur. Hann varð eykavaldur í 1943, 1945 og aftur í 1950. Í 1978 og 1980 hevði stóra undirtøkan hjá Paula Ellefsen við sær, at Eli Nolsøe varð eykavaldur í Norðoyggjum. Síðani tá hevur Sambandsflokkurin ikki verið umboðaður í Norðoyggjum, og tað eru altso 64 ár síðani, at flokkurin seinast vann valdømisvaldan tingmann í Norðoya valdømi.

Sjálvstýrisflokkurin langt frá umboðan

Síðani valdømisvaldu tingmenninir fyri Norðoyggjar við broytingini í vallógini í 1978 tvífaldaðust úr tveimum og upp í fýra, hevur Sjálvstýrisflokkurin fleiri ferðir vunnið ein av monnunum. Kanningin hóskvøldið bendir á, at tað ikki longur er realistiskt at rokna við hesum møguleikanum. Hóast Sjálvstýrisflokkurin eigur lutfalsliga størri umboðan í Norðoyggjum enn í nøkrum øðrum valdømi, so skal hann - sammett við kanningina hóskvøldið - meiri enn tvífaldast í Norðoyggjum á valinum týsdagin, um hann skal hava møguleika at kappast um valdømisvaldu tingmenninar.

Asbjørn Joensen, sáli, var valdømisvaldur tingmaður fyri Sjálvstýrisflokkin í Norðoyggjum fleiri ferðir. Hann varð valdur í 1978, 1980, 1984 og aftur í 1990. Í 1994 endurvann Álvur Zachariasen sessin fyri Sjálvstýrisflokkin í Norðoyggjum. Síðani hann fall á valinum í 1998, hevur Sjálvstýrisflokkurin ikki rokkið nóg dyggari undirtøku at vinna valdømisvaldan tingmann.

Sjálvstýrisflokkurin í Norðoyggjum var fyri tveimum árum síðani við í kappingini um einsamalla eykavalda tingmannin hjá flokkinum. Um veljararnir flokka seg soleiðis týsdagin, um teir gjørdu í kanningini hóskvøldið, so tykjast møguleikarnir smáir fyri, at einsamalli sjálvstýrismaðurin skal verða valdur í Norðoyggjum.

Miðflokkurin hevur ongantíð havt umboðan í Norðoyggjum. Hóast talan hevur verið um støðuga framgongd hjá flokkinum á øllum valunum, síðani flokkurin varð stovnaður, so er undirtøkan í Norðoyggjum framvegis ikki nóg stór til, at tað ber til at ímynda sær, at flokkurin í Norðoyggjum fer at fáa eykavalt umboð.

Tríggir flokkar kappast um ein sess

Sambandsflokkurin tykjast skula varðveita sína stinnu støðu í Norðstreymi, har kappingin er sera stór um seinna mannin, og har úrslitið tykist torførari at meta um, enn tað er nakra aðra staðni

NORÐSTREYMOYAR VALDØMI
Jóannes Hansen

Eingin ivi er um tað. Sambandsflokkurin, sum burtursæð frá valskeiðunum 1998-2002 hevur átt umboðan í Norðstreymi, er sambært kanningini hóskvøldið so nógv stinnastur, at tað ikki ber til at ímynda sær, at hann ikki fer at fáa fyrra mannin.

Tað er so mikið tætt í kappingini um seinna mannin í Norðstreymi, at tað als ikki ber til at rokna við, hvør fer at verða valdur. Javnaðarflokkurin við 21,3% liggur sambært kanningini hóskvøldið best fyri, men tað er heilt stutt aftur til Tjóðveldisflokkin við 20,4 og Fólkaflokkin við 20,0%. Seinastu tvey árini hevur Tjóðveldisflokkurin átt umboð í Norðstreymi saman við Sambandsflokkinum.

Tað eru fleiri viðurskifti og umstøður, sum mugu roknast at gera tað uppaftur torførari at meta um gongdina í Norðstreymi, enn tað plagar at vera. Eitt er, at tað fyri tveimum árum síðani fyri fyrstu ferð í rættuliga nógv ár eydnaðist bygdunum í Sundalagnum at vinna tingmann. Tað eydnaðist, tá ið Heðin Zachariasen vann eykavalda sessin hjá Fólkaflokkinum. Spurningurin er nú, í hvønn mun tað, at tað eydnaðist seinast, fer at hava við sær, at Heðin fer at fáa størri undirtøku. Tað kann roknast við, at Heðin Zachariasen fer at fáa dygga kapping frá vestmenningum. Fyri tveimum árum síðani vóru tveir vestmenningar á fólkaflokslistanum. Nú er Ingi Olsen, sum seinast var næstfremstur, einsamallur úr Vestmanna á fólkaflokslistanum.

Ein annar spurningur er, hvussu Tjóðveldisflokkurin fer at standa seg í Vestmanna og í Kollafirði. Í Vestmanna er Jógvan Durhuus, sum var tingmaður tað mesta av tíðini frá 1970 og fram til síðsta valskeið, tá ið hann viðhvørt var inni fyri Niklaa Petersen, ikki á listanum. Tað hevur onkra ferðina víst seg, at veljarar ikki bara skifta persón, men eisini kunnu finna upp á at skifta flokk, tá ið tey ikki kunnu atkvøða fyri tí, sum tey annars hava atkvøtt fyri.

Kollfirðingar hava nógvu tær seinastu ferðirnar skift nógv millum flokkar. Teir settu fleiri ferðir Thomas Arabo úr Javnaðarflokkinum á ting, teir hava tikið undir við bæði Terja Davidsen úr Sambandsflokkinum og Jákup Suna Joensen úr Fólkaflokkinum, og seinast settu teir Nikláa Petersen á ting.

Einki er at ivast í, at um tað eydnast Javnaðarflokkinum at varðveita næstfremsta plássið, sum kanningin hóskvøldið legði upp til, at teir hava møguleika at vinna, so verður tað Hans Pauli Strøm, ið fer at verða valdur. Hans Pauli var eykavaldur 1998-2002. Bæði Javnaðarflokkurin í Norðstreymi og Hans Pauli Strøm persónliga høvdu framgongd á valinum fyri tveimum árum síðani, men tað var ikki nóg mikið til at vinna valdømisvaldan tingsess, og eykamaðurin hjá Javnaðarflokkinum flutti í Suðurstreymoy.

Tvær tær seinastu ferðirnar hevur ein eykavaldur tingmaður verið úr Norðstreymi. Síðsta valskeiðið hevur hann, sum sagt, verið Heðin Zachariasen úr Fólkaflokkinum og næstsíðsta valskeiðið var tað Hans Pauli Strøm úr Javnaðarflokkinum. Møguleiki tykist vera fyri, at tað aftur eftir valið týsdagin verður ein eykavaldur tingmaður úr Norðstreymi. Tað kann eitt nú gerast veruleiki, um Tjóðveldisflokkurin missir valdømisvalda tingmannin, og um atkvøðubýtið kring landið verður umleið soleiðis, sum tað var í kanningini hóskvøldið.

Sambandið á veg móti tveimum vágamonnum

Eingin ivi er um, at Sambandsflokkurin fer at fáa fyrra mannin í Vágum, meðan Javnaðarflokkurin tykist hava møguleika at blanda seg í kappingina millum Fólkaflokkin og Sambandsflokkin um seinna mannin

VÁGA VALDØMI
Jóannes Hansen

Vága valdømi er háborgin hjá Sambandsflokkinum. Sambært veljarakanningini hóskvøldið fær Sambandsflokkurin nú dyggari undirtøku í Vágum, enn Javnaðarflokkurin hevur í Suðuroy. Tað er óhoyrt.

Við 41,4 % av atkvøðunum í kanningini tykist tað ivaleyst, at Sambandsflokkurin fer at fáa fyrra valdømisvalda mannin. Stóri spurningurin er, um tað fer at eydnast sambandsmonnunum í Vágum eisini at vinna hin mannin. Um úrslitið á valinum um eina viku verður tað sama, sum kanningarúrslitið hóskvøldið vísti, so fer Sambandsflokkurin at vinna báðar tingmenninar í Vágum.

Síðani floksbýtið í 1906 er tað ongantíð komið fyri, at Sambandsflokkurin hevur vunnið báðar tingmenninar í Vágum. Nakrar ferðir er tað komið fyri, at aðrir flokkar hava megnað hetta. Tá ið tað bara vóru tveir flokkar, átti Sjálvstýrisflokkurin fleiri ferðir báðar tingmenninar í Vágum, og undir kríngum, tá ið Fólkaflokkurin var so sera stinnur, vunnu teir bæði umboðini í Vágum. Tað var í 1943.

Í veljarakanningini, sum tríggjar vikur undan valinum fyri tveimum árum síðani varð gjørd í teimum sjey valdømunum, vístu tølini í Vágum, at Sambandsflokkurin stóð til at vinna báðar tingmenninar. Men rákið broyttist eitt sindur í valstríðnum. Á valinum 30. apríl var Sambandsflokkurin størstur við 38 %, meðan Fólkaflokkurin fekk 24 prosent, og harvið vunnu hesir báðir hvør sítt umboð.

Kanningin hóskvøldið vísti, at varðveitsla Sjálvstýrisflokkin í Norðoyggjum fleiri ferðir. Hann varð valdur í 1978, 1980, 1984 og aftur í 1990. Í 1994 endurvann Álvur Zachariasen sessin fyri Sjálvstýrisflokkin í Norðoyggjum. Síðani hann fall á valinum í 1998, hevur Sjálvstýrisflokkurin ikki rokkið nóg dyggari undirtøku at vinna valdømisvaldan tingmann.

Sjálvstýrisflokkurin í Norðoyggjum var fyri tveimum árum síðani við í kappingini um einsamalla eykavalda tingmannin hjá flokkinum. Um veljararnir flokka seg soleiðis týsdagin, um teir gjørdu í kanningini hóskvøldið, so tykjast møguleikarnir smáir fyri, at einsamalli sjálvstýrismaðurin skal verða valdur í Norðoyggjum.

Miðflokkurin hevur ongantíð havt umboðan í Norðoyggjum. Hóast talan hevur verið um støðuga framgongd hjá flokkinum á øllum valunum, síðani flokkurin varð stovnaður, so er undirtøkan í Norðoyggjum framvegis ikki nóg stór til, at tað ber til at ímynda sær, at flokkurin í Norðoyggjum fer at fáa eykavalt umboð.

Tríggir flokkar kappast um ein sess

Sambandsflokkurin tykjast skula varðveita sína stinnu støðu í Norðstreymi, har kappingin er sera stór um seinna mannin, og har úrslitið tykist torførari at meta um, enn tað er nakra aðra staðni

NORÐSTREYMOYAR VALDØMI
Jóannes Hansen

Eingin ivi er um tað. Sambandsflokkurin, sum burtursæð frá valskeiðunum 1998-2002 hevur átt umboðan í Norðstreymi, er sambært kanningini hóskvøldið so nógv stinnastur, at tað ikki ber til at ímynda sær, at hann ikki fer at fáa fyrra mannin.

Tað er so mikið tætt í kappingini um seinna mannin í Norðstreymi, at tað als ikki ber til at rokna við, hvør fer at verða valdur. Javnaðarflokkurin við 21,3% liggur sambært kanningini hóskvøldið best fyri, men tað er heilt stutt aftur til Tjóðveldisflokkin við 20,4 og Fólkaflokkin við 20,0%. Seinastu tvey árini hevur Tjóðveldisflokkurin átt umboð í Norðstreymi saman við Sambandsflokkinum.

Tað eru fleiri viðurskifti og umstøður, sum mugu roknast at gera tað uppaftur torførari at meta um gongdina í Norðstreymi, enn tað plagar at vera. Eitt er, at tað fyri tveimum árum síðani fyri fyrstu ferð í rættuliga nógv ár eydnaðist bygdunum í Sundalagnum at vinna tingmann. Tað eydnaðist, tá ið Heðin Zachariasen vann eykavalda sessin hjá Fólkaflokkinum. Spurningurin er nú, í hvønn mun tað, at tað eydnaðist seinast, fer at hava við sær, at Heðin fer at fáa størri undirtøku. Tað kann roknast við, at Heðin Zachariasen fer at fáa dygga kapping frá vestmenningum. Fyri tveimum árum síðani vóru tveir vestmenningar á fólkaflokslistanum. Nú er Ingi Olsen, sum seinast var næstfremstur, einsamallur úr Vestmanna á fólkaflokslistanum.

Ein annar spurningur er, hvussu Tjóðveldisflokkurin fer at standa seg í Vestmanna og í Kollafirði. Í Vestmanna er Jógvan Durhuus, sum var tingmaður tað mesta av tíðini frá 1970 og fram til síðsta valskeið, tá ið hann viðhvørt var inni fyri Niklaa Petersen, ikki á listanum. Tað hevur onkra ferðina víst seg, at veljarar ikki bara skifta persón, men eisini kunnu finna upp á at skifta flokk, tá ið tey ikki kunnu atkvøða fyri tí, sum tey annars hava atkvøtt fyri.

Kollfirðingar hava nógvu tær seinastu ferðirnar skift nógv millum flokkar. Teir settu fleiri ferðir Thomas Arabo úr Javnaðarflokkinum á ting, teir hava tikið undir við bæði Terja Davidsen úr Sambandsflokkinum og Jákup Suna Joensen úr Fólkaflokkinum, og seinast settu teir Nikláa Petersen á ting.

Einki er at ivast í, at um tað eydnast Javnaðarflokkinum at varðveita næstfremsta plássið, sum kanningin hóskvøldið legði upp til, at teir hava møguleika at vinna, so verður tað Hans Pauli Strøm, ið fer at verða valdur. Hans Pauli var eykavaldur 1998-2002. Bæði Javnaðarflokkurin í Norðstreymi og Hans Pauli Strøm persónliga høvdu framgongd á valinum fyri tveimum árum síðani, men tað var ikki nóg mikið til at vinna valdømisvaldan tingsess, og eykamaðurin hjá Javnaðarflokkinum flutti í Suðurstreymoy.

Tvær tær seinastu ferðirnar hevur ein eykavaldur tingmaður verið úr Norðstreymi. Síðsta valskeiðið hevur hann, sum sagt, verið Heðin Zachariasen úr Fólkaflokkinum og næstsíðsta valskeiðið var tað Hans Pauli Strøm úr Javnaðarflokkinum. Møguleiki tykist vera fyri, at tað aftur eftir valið týsdagin verður ein eykavaldur tingmaður úr Norðstreymi. Tað kann eitt nú gerast veruleiki, um Tjóðveldisflokkurin missir valdømisvalda tingmannin, og um atkvøðubýtið kring landið verður umleið soleiðis, sum tað var í kanningini hóskvøldið.